# Ársfrágreiðing fyri Vísindasiðseminevndina 2020

Vísindasiðseminevndin er sett við heimild í "Lov om et videnskabsetisk komitésystem og behandling af biomedicinske forskningsprojekter", sum varð sett í gildi við kongligari fyriskipan nr. 961, 15. juli 2013.

Nevndin hevur sjey limir, fýra leikfólk og trý fakfólk við granskingarroyndum innan heilsuvísind.

Limirnir í 2020:

- Jens Andreassen, formaður, lækni og granskari
- Gunnhild Helmsdal, lækni og granskari
- Ann E. Østerø, leiðari á Diagnostiska Deplinum, LS
- Oluf Færø, næstformaður, cand. scient
- Kári Purkhús, lívfrøðingur
- Gunnvør á Norði, granskari
- Armgarð Arge, cand. theol. og tíðindakvinna

Skrivari: Ann E. Østerø

Endamálið hjá Vísindasiðseminevndini er at tryggja, at heilsuvísindaligar granskingarverkætlanir eru skipaðar á vísindasiðsemiligum tryggum grundarlagi. Sum grundregla skulu rættindi og tryggleiki hjá royndarpersóninum takast framum vísindalig og samfelagslig áhugamál í heilsugransking.

Avgerðir hjá føroysku vísindasiðseminevndini kunnu kærast til NVK (Nationale Videnskabsetiske Komité) í Danmark. Sami kærumøguleiki er fyri avgerðir tiknar av staðbundnu vísindasiðseminevndunum í Danmark.

Umframt lóggávuna fyriheldur nevndin seg til almennu meginreglurnar hjá NVK, soleiðis sum tær eru tøkar á heimasíðuni www.nvk.dk.

## *Fundir og umsóknir*

Árið 2020 var sermerkt av coronafarsóttini. Nevndin hevði 9 fundir, harav fleiri av teimum vóru videofundir. Nevndin viðgjørdi 26 umsóknir og fyrispurningar viðv. granskingarverkætlanum, harav:

9 nýggjar verkætlanir vóru góðkendar
5 ískoytis- ella broytingarverkætlanir vóru góðkendar
2 verkætlanir fingu longda freist
1 verkætlan var ikki góðkend
5 verkætlanir kravdu ikki góðkenning
4 fyrispurningar um verkætlanir og innlit fingu svar

Í hvørjum einstøkum føri kom nevndin til eina felags niðurstøðu, og ongin niðurstøða kravdi atkvøðugreiðslu í nevndini.

Av 26 umsóknum og fyrispurningum kravdu 4 longri enn 60 daga viðgerð.

## *Góðkendar verkætlanir í 2020*

1. *"Ávirkan av langtíðarvenjing á blóðstorknan hjá sjúklingum við hjartaæðrasjúku".*
2. *"Glukosu metabolisma og immunverja hjá vaksnum fólki, sum hava verið fyri dálkingarevnum í móðurlívi"* – Ískoytisverkætlan.
3. *"The Faroese Knee Cohort – An investigation of etiology and long-term implications of Trochlear Dysplasia and patellar dislocations".*
4. *"COVID-19 mørketal på Færøerne".*
5. *"Symptombilledet efter påvisning af smitte af COVID19 hos færinger".*
6. *"Optic nerve effects of prenatal pollutant exposure: The eye-brain connection as a neurotoxicity hotspot".*
7. *"Variance of genetics and serum antibodies in SARS-CoV-2 positive patients in the entire population of the Faroe Islands".*
8. *"Viðkvæmi í barnaárum fyri immuntálmandi dálkingarevnum"* – Ískoytisverkætlan.
9. *"COVID-19 mørketal på Færøerne"* – Ískoytisverkætlan.
10. *"Heilsa og Andsevnir hjá eldri føroyingu – ein 10 ára uppfylgjandi kanning"* – Ískoytisverkætlan.
11. *"FarGen-PGx".*
12. *"Mikrobiom og Parkinson sjúka".*
13. *"Ávirkan av langtíðarvenjing á blóðstorknan hjá sjúklingum við hjartaæðrasjúku"* – Ískoytisverkætlan.
14. *"Ávirkan av langtíðarvenjing á blóðstorknan hjá sjúklingum við hjartaæðrasjúku"* – Leinging.
15. *"Hagfrøðislig forkanning av frábrigdum í arvaeginleikum (DNA) í tí samlaða arvamassanum (genominum) hjá einum lítlum bólki av føroyingum"* – Leinging.
16. *"Andevnir í kroppinum eftir koppseting móti COVID-19".*

## *Virksemi og netverkan*

Hóast ætlanin var at fara á ymiskar ráðstevnur í norðanlondum, eitt nú í Helsinki, vóru hesar avlýstar vegna coronafarsóttina.

Næstformaðurin hevur tó, eins og undanfarin ár, havt framløgu fyri lesandi á Fróðskaparsetrinum um galdandi vísindasiðsemiliga lóggávu og givið góð ráð í samband við ætlan um granskingarverkætlanir.

Vinaliga

Ann E. Østerø
Skrivari í Vísindasiðseminevndini